## Ein vika til Dráttur-kappingina

Flogbóltsfelagið Dráttur skipar komandi vikuskiftið fyri síni árligu kapping fyri yngri lið. Spælt verður leygardagin, og verður hetta gjørt á Giljanesi og í Høllini í Kollafirði. Spælt verður í bæði gentu- og dreingjarøðunum, og fevnir kappingin um allar aldursbólkar upp til og við unglingar.

## Andrew hevur skotið seg heitan

Fremad Amager spældi týskvøldið venjingardyst ímóti AB70, og liðið av Amager vann dystin 4-3. Andrew av Fløtum sat á beinkinum í fyrra hálvleiki, men kom inn í hálvleikssteðginum. Hóast hann bert spældi 45 minuttir, skoraði Andrew tvey mál. Hetta var annan venjingardystin á rað, at Andrew av Fløtum skoraði tvey mál fyri Fremad Amager.



# Blokkurin hevur stóran týdning

**Hetta sigur Jan Áki H. Olsen hjá ÍF, sum væntar ein harðan og spennandi dyst ímóti Mjølni. Hann sigur eisini, at fuglfirðingar mugu royna at leggja stórt trýst á við servunum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

ÍF hevur verið eitt av fremstu feløgunum í føroyskum mansflogbólti síðstu árini. Bæði í landskappingini og í steypakappingini hava teir sera góð úrslit at vísa á, og árið í ár er einki undantak í so máta.

Í landskappingini hava teir ligið á odda alt kappingarárið, og einasta veruliga hóttan er komin frá Mjølni, sum hevur roynt at fylgt við fuglfirðingum. ÍF er enn á odda, men munurin niður til Mjølnir er bara eitt stig, so meistaraheitið verður helst avgjørt í síðsta innanhýsis dystinum ímillum hesi bæði feløgini.

Í steypakappingini hevur eisini gingið eftir ætlan. Í FK-kappingini megnaði ÍF ikki at leika seg í steypafinaluna, men í Mjølnirkappingini eydnaðist betri. Tá vann ÍF kappingini, og sostatt gjørdist greitt, at teir skuldu møta Mjølni í steypafinaluni.




*Dystirnir millum ÍF og Mjølnir eru næstan altíð spennandi. Undan mansfinaluni tykjast báðir leggja nógv fyri til tess at steðga útlendsku profilunum hjá mótstøðuni*

### Skulu steðga Vladi

Hjá fuglfirðingum stendur væl til við fólki til dystin leygardagin. Allir mans eru tøkir, og Jan Áki heldur, at liðini í steypafinaluni eru tey røttu.

- Fleiri av hinum liðunum hava bitið frá sær í onkrum dysti, men sum heild haldi eg, at vit og Mjølnir hava havt tey mest støðugu úrslitini í ár, so ein finala ímillum hesi liðini er helst í lagi.

Jan Áki sigur seg eisini vænta ein sera spennandi dyst leygardagin, og hann heldur, at ÍF má halda eitt serliga vakið eyga við útlendska leikaran hjá Mjølni, Vladi.

- Dystirnir millum ÍF og Mjølnir eru næstan altíð spennandi, og tað verður hesin helst eisini. Eg haldi, at vit mugu ansa sera væl eftir Vladi. Hann er ein ómetaliga góður leikari, og hann hevur nógv at siga fyri teir. Teir eru tó eisini sterkir á miðjuni, so her mugu vit eisini vera klárir.

### - Vit eru sterkir í gólvinum

Jan Áki og hansara liðfelagar í ÍF hava havt eitt avbera gott kappingarár, men seinast teir vóru á vøllinum gekk ikki so væl.

- Eg veit ikki, hvat hendi, tá vit taptu ímóti Fram. Vit hava vunnið næstan allar dystirnar, og møguliga hildu vit, at hetta bara fór at ganga. Hetta kemur tó bert at ávirka rætta vegin í steypafinaluni, tí hetta hevur givið okkum eitt ordiligt spark í reyvina.

Jan Áki heldur eisini, at ÍF hevur tað, sum skal til fyri at vinna steypafinaluna leygardagin.

- Vit hava eitt sera gott lið, og tað verður týdningarmikið at fáa blokkin at rigga móti Mjølni. Í gólvinum eru vit tó eisini sera sterkir, og her fáa vit nógvar ómøguligar bóltar upp, og hetta kann ofta virka rættiliga drepandi fyri hitt liðið.

- Eg meti eisini, at servurnar hjá okkum vera týdningarmiklar leygardagin. Vit skulu leggja teir undir trýst í servunum, so hevarin ikki fær so góðar bóltar at heva, segði Jan Áki at enda.

## Miðjan verður avgerandi

**- Boban er sterkasti vápnið hjá ÍF, so honum skulu vit steðga. Hetta sigur Eyðstein Elttør hjá Mjølni. Hann væntar eisini, at miðjan hjá Mjølni kann blíva sera avgerandi í steypafinaluni**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mjølnir hevur stórar traditiónir innan flogbóltin, har bæði kvinnur og menn hava nógv góð úrslit at vísa á. Í ár er tað tó serliga menninir, sum hava bitið frá sær, og hetta hevur givið úrslit í bæði landskappingini og í steypakappingini.

Í landskappingini hava verið tvey oddalið frá fyrsta umfari, og serliga ÍF hevur sett dagsskránna í bestu mansdeildini. Teir hava ligið á odda allan vegin, men Mjølnir hevur alla tíðina hingið væl í teimum. Í løtuni er munurin bert eitt stig ímillum hesa bæði liðini, so enn er einki avgjørt, hvat av liðunum fer avstað við meistaraheitinum.

Ikki var nógv liðið av kappingarárinum, áðrenn menninir hjá Mjølni høvdu tryggjað sær pláss í steypafinaluni. Teir vunnu nevniliga FK-kappingina, sum var í oktober mánaða, og nú bíða størstu kappingarneytarnir, ÍF, í finaluni.

### – Teir kempa væl

Hjá Mjølni eru eisini allir mans tøkir til dystin, og Eyðstein Elttør sigur, at vísir liðið eitt sindur betri spæl, enn tað vísti í seinasta dystinum ímóti ÍF, so skal tað nokk ganga.

– Seinast vit møttu fuglfirðingum, tá taptu vit 3-0. Vit vóru tó rættiliga væl við, og spæla vit eitt vet betri enn tá, so ivist eg ikki í, at vit saktans kunnu vinna dystin.

Hann væntar tó ikki nakran léttan dyst, og metir, at ÍF hevur eitt sera gott lið á fleiri økjum.

– ÍF er eitt lið, sum kempar ótrúliga væl. Teir geva ikki upp, og serliga í gólvinum eru teir ótrúliga sterkir. Teir fáa nógvar ómøguligar bóltar upp aftur, og hetta er kanska største styrkin hjá teimum. Teir hava eisini Boban, sum er ein sera góður leikari. Hann er helst sterkasta vápnið hjá teimum, so honum skulu vit steðga.

### Skulu fáa miðjuna við

Eyðstein heldur, at Mjølnir hevur góðar møguleikar at vinna dystin ímóti ÍF, og hann væntar, at miðjurnar kunnu fáa ein avgerandi leiklut í hesum dystinum.

– Vit hava tvær sera sterkar miðjur, og her eru vit helst sterkast í landinum. Fáa vit miðspæli at koyra, so vænti eg, at tað verður trupult hjá ÍF. Hetta krevur tó eisini, at móttøkurnar eru góðar, soleiðis at Bogi fær møguleikan at geva miðjunum góðar bóltar at spæla við. Bogi verður eisini ein týdningarmikil leikari henda dagin, tí hann hevur rutinu, og hann er helst besti hevari í landinum í løtuni.

– So hava vit eisini Vladi. Hann er ein sera góður leikari, og tað verur altavgerandi hjá okkum at fáa hann við í spælið leygardagin, leggur Eyðstein aftur-at.